bústað, eitt pláss at búgva í. Tað kann eisini merkja at liggja og lúra, drála/bíða, at verða í umráðnum (á enskum umset til *„hang around“*). Hetta orð lýsir væl samspælið í lovsanginum; tá vit menniskju yvirgeva okkum til Gud og sostatt gera Honum eina trónu við okkara lovsangi, so vil Hann koma og seta seg á hesa trónu/taka bústað í okkara lovsangi og vera saman við okkum. Gud er eisini altíð í 'nærheitini' klárur til at vera saman við okkum, so skjótt sum vit velja at søkja Hann.

Sálmur 22 er ein mesianskur sálmur, tað merkir, at hann sipar til tíðina tá Jesus hekk á krossinum. Sostatt vísir Sálmur 22:3 eisini til, at í tínum myrkastu umstøðum býr Gud eisini í lovsanginum. Tvs. at tú í øllum umstøðum kanst velja at lovsyngja, og tín tilbiðjan vil altíð lata upp fyri Guds nærveru og dýrd til bæði anda, sál, likam og umstøður. Lovsangur og tilbiðjan er tískil ikki nakað, ið er ætlað bert at vera ein partur av okkara møtum, men hetta er ein persónligur lívsstílur, sum ongantíð er tengdur at umstøðum. Tá vit so koma saman og tilbiðja í felagsskapi, vil tað lata upp fyri eini størri dýpd av Guds nærveru og dýrd, og í hesi samveru vil Ríkið Guds manifestera seg – eisini við teknum og undrum.

Hóast vit elska lovsangin og tilbiðanina á møtum okkara, gerast vit ongantíð nøgd, tí vit leingjast alla tíðina eftir meira av Guds nærveru og opinbering. Vit vilja brúka enn meira tíð upp á at byggja trónu Guds, og tí hava vit avgjørt, at frá komandi sunnudegi – t.v.s. frá 3. mars – fara vit í lovsangsbólkinum at byrja okkara lovsang og tilbiðjan hvønn sunnudag **kl 10:45.** Almennu møtini byrja enn sum áður kl 11, og vit vænta ikki av samkomuni, at fólk møta upp kl 10.45. Tó eru øll, ið hava hug, sjálvandi vælkomin:-)

Vit ynskja at geva enn meiri rúm fyri Guds opinberingum í lovsanginum og fyri, at vit kunnu virka og royna okkum í náðigávunum, ið verða forloyst í lovsanginum. Vit vilja síggja Ríki Guds í enn størri mun verða forloyst í okkum og Hansara livandi vatn streyma úr okkum.

*NAA og AMD*

## Guttakvøld



verður aftur 9. mars kl 19 í íbúðini. Borðreitt verður við ræstum kjøti og sum altíð møta vit við tí góða humørinum og fáa góðan mat, gott prát og eitt gott orð 🙂

Kostnaðurin fyri kvøldið er kr 150.

Tilmelding hjá Levi (tlf. 764824) ella Tummas (tlf. 239876)



Filadelfia
*„Himmal á jørð“*

# Tú hin Heilagi, sum situr uppi yvir lovsongum



Tá hugsað var um lovsang, kom ørindi 3 í Sálma 22 okkum í huga: *„Og tó ert Tú hin Heilagi, sum situr uppi yvir lovongum Ísraels“*. Tí tað er ongin loyna, at lovsangur er ein týdningarmikil partur av møtunum hjá okkum í Filadelfia og at vit elska at lovprísa og tilbiðja okkara Gud og pápa. Vit virðismeta lovsang og tilbiðjan so høgt, tí tað fyri okkum er vorðin ein sannroynd, at her verður Himmalin latin upp fyri okkum, Gud vísir seg fyri okkum og vit merkja Hansara nærveru. Nærvera Guds er eisini nakað, sum vit sum samkoma elska og áhaldandi søkja meira av. Tá vit seta hetta í samband við Sálma 22:3: *„Og tó ert Tú hin Heilagi, sum situr uppi yvir lovsongum Ísraels“* (í KJV stendur *„God inhabits the praises of His people“* og í NIV stendur *„God is enthroned on the praises of Israel“)* er tað orðið 'situr uppi yvir' ella 'inhabits/sits enthroned', ið er lyklaorðið. Hebraiska upprunaorðið er ***Yawshab***. Tað merkir at sita á einum fyrireikaðum/tilgjørdum setrið ella trónu, at dvølja, verða verandi, sláa seg niður/búsetast ella at giftast, alsamt verða verandi, stovna ella byggja ein

## STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri! *Samkomuleiðslubólkurin*

# MARS 2024

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 2. | | **Reingerð:** Malena og co. |
| Sunnudagur | 3. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Fríðbjørn og Linda |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Anna-May |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragmar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Ása O. |
| | | | Kaffivertar: Fríðbjørn og Linda |
| Mánadagur | 4. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna-May |
| Leygardagur | 9. | | **Reingerð:** Anna-May og co. |
| | | Kl. 19.00 | **Guttakvøld** |
| Sunnudagur | 10. | Kl. 11.00 | **Familjumøti við morgunmati** |
| | | | Møtivertar: Nora, David og Kári |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Conny |
| | | | Lovsongsleiðari: bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: |
| | | | Kaffivertar: Nora, David og Kári |
| Mánadagur | 11. | Kl. 19.00 | **Felagsbønarmøti í Klaksvík** |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Solo Deo Gloria |
| Leygardagur | 16. | | **Reingerð:** Nomi og co. |
| Sunnudagur | 17. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Mariann |
| | | | Lovsongsleiðari: Ingun, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Alex |
| | | | Kaffivertar: No-omi, Marner, Hellen og Sjúrður |
| Mánadagur | 18. | Kl. 20.00 | **Bønarskúlin** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna |
| Týsdagur | 19. | Kl. 19.30 | **Ársmøti** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Anna-May |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Leygardagur | 23. | | **Reingerð:** Karin og co. |
| Sunnudagur | 24. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti – inns. til húsið** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Tummas J. |
| | | | Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur I |
| | | | Uppvørpa: Ása Elisabeth |
| | | | Ljóðbland: Tummas D. |
| | | | Tulkur: Høgni |
| | | | Talari: Mariann |
| | | | Kaffivertar: Eyðbjørg og Áshild |
| Mánadagur | 25. | Kl. 20.00 | **Lovprísan og forbøn** |
| | | | Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur |
| Leygardagur | 30. | | **Reingerð:** Ingun og co. |
| Páskadagur | 31. | Kl. 11.00 | **Morgunmøti v. breyðbróting** |
| | | Kl. 11.45 | **Barnamøti** |
| | | | Møtivertar: Fríðbjørn og Linda |
| | | | Ábyrgd/Leiðari: Ása O. |
| | | | Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II |
| | | | Uppvørpa: Ragnar |
| | | | Ljóðbland: Sjúrður |
| | | | Tulkur: Ragnar |
| | | | Talari: Anna-May |
| | | | Kaffivertar: Fríðbjørn og Linda |

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

## Familjumøti og morgunmatur

Sunnudagin 10. mars verður morgunmatur við øllum, sum har hoyrir til. Vit byrja kl. 11.00.



Áleið kl.11.45 byrjar familjumøti við sangi, framførslu, okkurt skemt verður eisini og sjálvandi eitt gott orð á vegnum frá Katy við Skipá.

Vit gleða okkum til ein góðan og hugnaligan dag saman.

Øll eru hjartaliga vælkomin.